skemt

# Smíl til fotografin

Hesin maðurin hevur ikki nakra lætta uppgávu at fáa eina góða familjumynd burturúr, men hann ger sítt frægasta og bæði klikkir og blitsar.

(Kelda: nym.fo)



## Skelti í hópatali



Hvar munnu vegskeltini halda til, tá ið tey ikki standa upp fram við føroyska vegjaðaranum. Well, her er eitt av teimum góðu goymustøðunum hjá skeltunum. Myndin er tikin undir Gøtueiði, og her er nokk av skeltum – blindur vegur, avmarkað ferð , yvirháling og annað. Ikki so galið at hava til at taka, men líka við at verða forvirrandi fyri tann, sum roynir at gera seg klókan upp á hesa myndina.

## Heimsins besta yvirvekt




Brasilski álopsspælarin Ronaldo var einaferð mettur sum heimsins besti álopsspælari, og hann er eisini toppskjútti í HM-endaspølunum hja FIFA. Men tað eru nøkur ár og fleiri kilo síðani, at Ronaldo var upp á sítt besta. Nu spælir tann rundari og rundari Ronaldo fyri AC Milan í Italia, og hann ger framvegis mál – av og á. Sunnukvøldið spældi AC Milan í Seriu A, og tað eydnaðist við neyð og deyð at vinna. Men Ronaldo, hann gjørdi seg mest merktan við at missa balansuna, einaferð hann hevði málkjans, og tað sá ikki serliga sjarmerandi út, tá ið brasiliumaðurin fór og bóltandi inni í brotsteignum hj á mótstøðuliðnum. Nei, tann tiltikna balansan er ikki, sum hon einaferð var . Tá skuldu tað fimm vælvaksnir verjuspælarar til at fáa Ronaldo um koll – nú klárar hann tað sjálvur!

# Í rangastrúpan

**Nógvir stjórar**
*Niels Juul Nattestad heldur fram sum stjóri í Statoil, og tað gera øll hini starvsfólkini eisini.*
Rás 2

**Gíslatøka**
*Fólk eru fangað á fiskavirkjum*
Sosialurin

*Jamen, so er bara at fara út Inniróðrarnir hava dapra framtíð*
www.123.fo

**Eru tey flutt?**
*Árið í ár roynist sera væl hjá Smyril Line í Noreg*
Vikublaðið

**Er tað eitt stórmál?**
*Bruce málið er nú avgreitt*
Olivant.fo

**Tað halda teir helst**
*Bjarni Djurholm og Poul Michelsen, er tað sikkurt, at tað er ein fyrimunur at hava ein so langan?*
Lesarabræv í bløðunum

## Leyst og fast um stórt og smátt

Óli P nevndi Norðuratlantsbólkin eina kajakk áðrenn fólkatingsvalið. Men nú er ein kvinna partur av tingbólkinum, so nú má Norðuratlantsbólkurin verða ein konubátur!

Anders Fogh Rasmussens skæbne ligger på Ørebakke!

Eitt er vist, Strandferðslan fær ikki ein so sterkan stjóra aftur!

Nú hevur Jacob Vestergaard fingið somu lagnu sum Strandferðslan. Arbeiðsplássið er flutt úr Havn og til Suðuroyar!

Sjálvstýrisflokkurin er vorðin ein "Kári"-stovnur. Kári á Rógvi, Kári Petersen og Kári P. Højgaard!

Sæð í ljósinum av Óðalsfelagnum, so hava Kári á Rógvi og Heðin D. Poulsen, ið hvussu er JØRÐ-forbindilsi í lagið.

Man kann so siga um Kári á Rógvi og Heðin D. Poulsen, at av JØRÐ eru teir komnir - uppí Sjálvstýrisflokkin!

Teir eru so ikki BÓNDA-fangaðir í Sjálvstýrisflokkinum!